# Libanon – veiki staturin í



**Arabiska útgávan av CNN ella BBC, Al-Jazeera, er á tremum við oyðilegging av bygningum og illa farnum mannakroppum. Bæði Irak og Libanon eru rakt av ófriði, og er hetta keldur til mikla vreiði og sorg í økinum. Í dag hyggja vit nærri at støðuni, og vit hava prátað við tveir ungar menn úr Jordan og Libanon, ið dagliga merkja til ófriðin.**

**Libanon er serliga merkt av at vera eitt lítið samfelag í Miðeystri, sum hýsir fleiri minnilutabólkum. Her finna vit ein hóp av ymiskum kristnum trúarsamfeløgum og muslimskum trúarsamfeløg. Borgarakríggið, ið varaði heili 15 ár, frá 1975-1990, hevur kravt mestu orkuna og fleiri lív frá hesum lítla samfelagnum, og sárini eru enn ikki lekt**

## MIÐEYSTUR – STRÍÐIÐ MILLUM ÍSRAEL OG HIZBOLLAH

*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Í 1946 gjørdist Libanon sjálvstøðug tjóð eftir at hava verið undir fronskum verndarstýri í 23 ár. Politiska skipanin hevur frá byrjan av, og undir fronskum valdi, tikið atlit til fjølbroyttu samansetingina av fólkabólkum í landinum. Valdið varð soleiðis býtt ímilllum trúarbólkarnar – tey kristnu, sunni muslimar, shia muslimar, drusarar og aðrar minni bólkar; tilsamans 17 skrásettir bólkar. Síðan Tjóðarsáttmálan frá 1943 hevur forsetin verið maronittiskur kristin, forsætisráðharrin sunni muslimur og tingsformaður í libanska tjóðartinginum shia muslimur. Somuleiðis vóru týdningarmikil embætisstørv og størv í herinum givin út eftir trúaruppruna. Átrúnaður varð soleiðis innflættaður í libanska fólkaræðið.

Tey fyrstu árini riggaði hetta væl. Stjórnmálafrøðingar vórðu hugtiknir av hesi skipanini. Pressan var fræls, almenna kjakið opið og lívligt. Eisini vórðu fólkaval regluliga hildin, hóast atkvøður vórðu fluttur aftur og fram. Men í 1958 var galið, og borgarakríggj brast á. Libanon hevði ongan virknan leiklut í 6 Daga krígnum í 1967. Eftir hetta kríggið bleiv Libanon ein høvuðsstøð hjá stríðandi palestinskum bólkum, ið skipaðu fyri álopum á Ísrael. Líka síðan hevur palestinska stríðið ímóti norðara parti av Ísrael verið kelda til mikið høvuðbrýggj hjá libansku mynduleikunum. T.d. í 1968 vórðu 13 ferðafólkaflogfør álopin og oyðiløgd á flogvøllinum í Beirut av ísraelskum stríðsflogførum í hevnisøk fyri palestinskar atgerðir.

Hendan støðan endaði í einum longum libanskum borgarakríggi í 1975. Upprunin til hetta borgarakríggj verður mettur at vera fleirtýddur, men ein høvuðsorsøk liggur palestinska hernaðarvirkseminum í suðurpartinum av Libanon.

Í 1978 tók Ísrael seg inn í sunnara part av Libanon og uppbygdi ein trygdarøki. Fram til 2000 er hetta trygdarøkið á ísraelskum hondum. Hizbollah-deildir taka seg inn á hetta økið í 2000, meðan ísraelar taka seg aftur.

Í dag eru shia muslimar hin størsti fólkabólkurin í landinum, 40 % av libansku íbúgvunum, størri enn tey kristnu og sunni muslimar. Hetta talið er ein meting, eingi almenn tøl av fólkatalinum, ið sigur frá støddini av trúarbólkunum, finnast. Hetta evnið er eitt tabu-evni í libanska politiska kjakinum.

Inntil 60ini vóru libansku